## Politikarar minni løn

Íslendska Alringið samtykti í gjár at leingja lógina, sum skerjir lønina hjá altingslimum og ráðharrum 10 prosent. Tann upprunaliga lógin um lønarlækkingina hjá tingmonnum og ráðharrum kom aftan á bankakreppuna í fjør eftir uppskoti frá táverandi samgongu millum Sjálfstæðisflokkin og Samfylkingina. Núverandi stjórnarsamgonga millum Samfylkingina og Tey Vinstragrønu hevur gjørt av at leingja lønarniðurskurðin, og í gjár samtykti Altingið, at niðurskurðurin skalæ eisini galda í 2010.



## Ikki bara veðrið

Tá grønlendski landsstýrisformaðurin, Kuupik Kleist, var á veðurlagsráðstevnu í Keypmannahavn, nýtti hann hetta høvið til at tingast við Evropasamveldið um betri handilssáttmálar. Við kringvarpið sigur hann, at ES hevur stóran áhuga fyri fiskirættindum við Vesturgrønland, og at landsstýrið vil fegið fáa meiri burtur úr hesum. Umframt ES tingaðist Kuupik Kleist við umboð fyri fjarskotin lond, sum hava búskaparligt og sosialt samstarv við ES. Fleiri av hesum londum hava somu politisku áhugamál sum Grønland, og her kunnu samstarvsmøguleikar vera, sigur Kuupik Kleist við KNR.

# Smái upsin er burtur úr veiðini



*Tað órógvar fiskimenn, at so lítið av smáupsa er uppi í veiðini hjá partrolarunum. Fyri nøkrum árum síðan var øvut. Tá var hópur av smáupsa, og menn spurdu, hvar gýtingarfiskurin er*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Hóast upsaveiðan hevur verið betri seinastu tíðina, enn hon var fyrra partin av heystinum, er tó eitt, sum av álvara er farið at órógva teir, ið fiska upsa. Tað, sum órógvar er, at lítil og eingin smáupsi er uppi í veiðini hjá partrolarunum longur**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fyri nøkrum árum síðan var upsin rættiliga smáur, og menn spurdu seg sjálvur, hvar gýtingarfiskurin mundi vera.

Nú er vent í holuni.

Fiskimenn spyrja nú, hvar hin smái upsin er, tí tað nógva av tí, ið veitt og landað verður, eru 1-arar, 2-arar og 3-arar, sum er stórur og góður fiskur.

Fiskimenn siga, at eini 70 prosent av veiðini hjá partrolarunum er 3-arar, meðan lítið og einki er til av 5-arum og 6-arum.

Tað, sum órógvar fiskimenn, er, at heilir árgangir av smáum upsa soleiðis vísa seg at vera burtur úr veiðini.

### Spurningurin

Hvør orsøkin er til hesa gongd við upsanum, veit eingin við vissu, men tað eru teir fiskimenn, sum halda, at onkrir skiparar ikki eru nóg skjótir at boða frá, tá ov nógvur smáur upsi er uppi í veiðini.

Vit hoyra av og á, at Fiskiveiðieftirlitið lýsir veiðibann, tí ungfiskur er á ávísum leiðum, og nøkur skip eru eisini tikin, tí tey ikki hava boðað frá, tá ov nógvur ungfiskur hevur verið uppi í veiðini.

Á landingarmiðstøðum verður váttað, at rættiliga lítið av upsa 4, 5 og 6 hevur verið uppi í veiðini hjá partrolarunum í heyst.

Sosialurin fer at venda aftur til hetta mál í øðrum blaði.

# Upsaveiðan hjá partrolarunum er batnað

**Nú uppundir jólahalguna hava fleiri skip landað í Saltangará, og í seinastuni hevur verið meiri vanligt, at skipini aftur eru so gott sum full undir lúkurnar**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í morgun landa fýra partrolarar í Saltangará.

Stelkur og Bakur og Heykur og Falkur, sum allir hava verið stuttan túr, hava umleið 72.000 og 108.000 pund.

Somu skip landaðu eisini seinasta fríggjadag. Tá høvdu Stelkur og Bakur 230.000 og Heykur og Falkur 350.000 pund.

Í gjár landaðu Polarhav og Stjørnan og Rókur og Lerkur í Saltangará. Hetta var ein góður túrur hjá Polarhavi og Stjørnuni, og veiðan vigaði tilsamans 450.000 pund. Rókur og Lerkur høvdu 170.000 pund tilsamans.

Á landingarmiðstøðini Kongshavn siga tey, at upsaveiðan hjá partrolarunum hevur verið heldur frægari í seinastuni, enn hon hevur verið fyrr í heyst.

Seinasta hósdag høvdu Jaspis og Ametyst fulla last, hjá Heyki og Falki vantaði lítið í fulla last, tá teir landaðu seinasta fríggjadag, og Polarhav og Stjørnan vóru næstan fullir, tá teir landaðu í Saltangará í gjár.

Øll veiðan hjá partrolarunum er upsi.




*Seinastu dagarnar hava fleiri skip lagt veiðina upp í Saltangará*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*